# Hallið er í ordan

**– Í almenna kjakinum um fíggjarlógina er fokus alt ov nógv á endaliga úrslitinum – í hesum føri hallið á 277 milliónir – í staðin fyri at hugt verður at, um vit fáa ein betri almennan sektor við hægri tænastustøði, sigur Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur. Hann leggur dent á, at hall og avlop á fíggjarlógum í størri mun skulu hanga saman yvir longri tíðarskeið enn í hvørjum einstøkum ári**

FÍGGJARLÓGIN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Núverandi hallið á fíggjarlógini er ikki eitt úrslit av einum fullveldisarbeiði, men heldur av eini gongd í føroysku vinnuni, sum gongur nógv ár aftur í tíðina, heldur Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur*

Herman Oskarsson er als ikki nøgdur við generella kjakið um fíggjarlógir sum heild. Hann metir, at bæði fjølmiðlar og politikarar stara seg blindar eftir endaligum úrslitum í staðin fyri at kanna, hvat peningurin í veruleikanum verður nýttur til.

– Tað er til stóran skaða fyri orðaskiftið, at alt snýr seg um endaligt hall ella avlop. Alt ov lítið verður gjørt at kanna, hvørjar tænastur verða betri, hvørjar fáa minni pening, og hvussu raðfestingin annars er á fíggjarlógini, sigur Herman Oskarsson.

## Frískur Tjóðveldisflokkur

Tá høvuðsendamálið bert tykist vera endaliga úrslitið, uttan at stóri spurningurin verður settur, hvat peningurin verður nýttur til, líkist hetta sambært búskaparfrøðinginum hugsunarháttinum í eini fyritøku.

– Einasta orsøkin til, at ein fyritøka hyggur at endaúrslitinum, er, tí hon helst skal vinna pening. Men soleiðis er ikki hjá tí almenna, sum hóast undirskot eigur at fokusera á tænastustøðið, eins og fyritøkan fyrst og fremst hugsar um endaliga úrslitið, sigur Herman Oskarsson. Hann leggur dent á, at um tað almenna so koyrir við undirskoti eitt avmarkað tíðarskeið, er tað nakað, vit mugu tillaga okkum eftir og loyva, og hetta skuldi eyðkent orðaskiftið um fíggjarlógina í størri mun, heldur búskaparfrøðingurin Herman Oskarsson.

– Tað almenna fer prinsipielt ikki á heysin, og t.d. hava íslendingar gjørt verkætlanir, sum hava koyrt við undirskoti í mong ár, men sum knappliga kasta nógv av sær og geva úrslit, sigur Herman Oskarsson.

Búskaparfrøðingurin heldur tað annars vera sunt og gott fyri orðaskiftið, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt sítt fíggjarlógaruppskot, hóast flokkurin situr í andstøðu.

– Júst slík initiativ frá andstøðuni hava vantað á í Føroyum, og er tað frálíkt, at fleiri koma við sínum ískoyti, tí av hesum stendst eitt breiðari kjak , heldur Herman Oskarsson.

## Fullveldi onga ávirkan

Herman Oskarsson hevur ikki havt stundir at seta seg inn í smálutir í fíggjarlógini 2004, sum Bárður Nielsen legði fram á tíðindafundi hósdagin seinnapart, men við framskrivingum, sum áður eru gjørdar, hevur hallið leingi verið í væntu.

– Men ógvuliga stutt er ligið út á árinum, og tískil eru allar súður ikki syftar enn. Úrslitið kann broytast sera nógv báðar vegir, sum árið líður, sigur Herman Oskarsson. Fíggjarmálaráðharrin Bárður Nielsen hevur meiri enn einaferð víst á, at stóra hallið er úrslit og arvur eftir fullveldissamgonguni, sum nú skal gjaldast, men Herman Oskarsson er ikki samdur við hesum.

– Føroyski búskapurin er sára einfaldur. Fara fiskaprísirnir upp, gongur væl, og fara teir niður, eru vit prísgivin. Saman við kreppuni í alivinnuni er hetta einfalda orsøkin til hallið, slær búskaparfrøðingurin fast.

Hann vísir á, at einasta ítøkiliga avleiðingin av fullveldissamgonguni er niðurskurðurin á blokkinum, og tað er og vil altíð vera ein politiskur og hugsjónarligur spurningur, um hann skuldi verið skerdur ella ikki.

– Annars er núverandi hall eftir mínum tykki ikki eitt úrslit av einum fullveldisarbeiði, men heldur av eini gongd í føroysku vinnuni, sum gongur nógv ár aftur í tíðina, heldur Herman Oskarsson.

## Neyðugur útreiðsluvøkstur

Høvuðseyðkennið í undanfarnu samgongu er sambært búskaparfrøðinginum ikki, at teir arbeiddu fyri fullveldi, men heldur, at teir øktu almennu útreiðslurnar við umleið einari milliard.

– Tað var neyðugt við bygnaðarbroytingum í almennu fyrisitingini, og tænastustøðið er eisini hækkað. Hetta hevur verið høvuðseyðkenni hjá undanfarnu samgongu framum fullveldisarbeiðið, heldur Herman Oskarsson.

Herman vísir á, at meðan politiska høvuðsendamálið hjá undanfarnu samgongu var fullveldi, er høvuðsarbeiði teirra øktu almennu útreiðslurnar, sum eru vaksnar við einari milliard.

– Uppskotið um útbygging í almannaverkinum, sum varð samtykt í tinginum eftir kreppuna við Norman Christensen og Edmundi Joensen á odda, er ikki framt fyrrenn í undanfarnu samgongu, og tískil hava almennu útreiðslurnar verið fyri slíkum vøkstri júst nú, greiðir Herman frá. Hann leggur dent á, at hesar broytingar í almannaverkinum vóru neyðugar og hava lyft tænastustøðið í føroyska samfelagnum.

– Hetta er orsøkin til stóra útreiðsluvøksturin, og tískil meti eg ikki, at talan er um ein ótálmaðan og óneyðugan vøkstur, hóast okkurt sjálvsagt kundi verðið spart onkustaðni, sigur Herman Oskarsson. Hann vísir víðari á, at fólk ikki fara at minnast undanfarnu samgongu sum fullveldissamgonguna, men heldur sum tað samgonguna, ið framdi samtyktu broytingarnar í almennu fyrisitingini og økti útreiðslurnar við einari milliard.

Samanumtikið undirstrikar Herman Oskarsson, at hóast stóra undirskotið í 2004 eigur fokus at vera á, um vit fáa ein betri almennan sektor við hægri tænastustøði, og at hall og avlop í størri mun skulu síggjast yvir longri tíðarskeið enn bert eitt ár í senn.




